## U17-landslið til NEVZA-Cup

Í sambandi við, at U17-landsliðið hjá kvinnum í flogbólti skal við til NEVZA-Cup í næsta mánaði, eru 18 spælarar úr Fleyr, KÍF, Mjølnir, TB, SÍ og ÍF tiknir út til venjingar og venjingardystir. Hópurin hevur longu havt onkra venjing og spælt ein venjingardyst, og fyrireikingarnar halda fram allan henda mánaðin og nakað inn í desember. Bæði venjingar og venjingardystir eru ymsastaðni kring landið, og spælt verður bæði ímóti liðum úr meistaradeildini og 1. deild hjá kvinnum.



## Todi til Føroya at venja

Todi Jónsson hevur gjørt av, at frá 1. januar fer nýggi fótbóltsskúli hansara javnan at vitja í Føroyum, so tað skal bera til hjá føroyskum fótbóltsspælarum at fáa persónliga venjing, har Todi venur/coachar einsamallur saman við spælaranum. Tað ber eisini til, at spælararnir eru tveir og tveir saman. Á heimasíðuni hjá fótbóltsskúlanum, www.fodboldcoaching.dk, ber at tekna seg til skeið, sum eru ávíkavist tríggjar og seks mánaðir til longdar.



Tá Magnus Matras eftir steðgin sveiggjaði sítt avrik upp á altjóða støði, skrædnaði tað fullkomuliga millum Kyndil og VÍF. Kyndil er framvegis liðið, sum eltir oddin, og VÍF er framvegis partur av botnstríðnum móti KÍF

Mynd: Álvur Haraldsen

### Kyndil-VÍF 30-23 (14-14):

# Magnus tók alt

**Magnus Matras stóð ein framúr dyst, og fyrst og fremst var hann munurin, tá Kyndil hálvavegna vann stórsigur á VÍF**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Mangan hava uppgerðirnar millum teir báðar arvafíggindarnar í føroyskum manshondbólti verið bæði tættar og harðar. Og fyrri hálvi tímin av uppgerðini sunnudagin var ikki so nógv øðrvísi í so máta.

Spælið var avgjørt ikki nakað at reypa hurrá fyri, og teknisku mistøkini vóru ríviliga nógv í tali. Viljin at stríðast hekk tó uttan á hvørjum tí einasta spælara, og nærdystirnir vóru bæði nógvir og harðir. Hartil var munurin ongan tíð meira enn tað eina málið, so intensitetinum bagdi einki, hóast kræsnu Kyndils- og VÍF-áskoðararnir mangan munnu hava sæð betri dystir millum liðini bæði.

### Magnus læsti

Avgerandi hendingin í dystinum kom hampuliga seint í fyrra hálvleiki. Magnus Matras og Erling Johannesen kappast í ár um plássið millum stólparnar hjá Kyndli, og hesa ferð byrjaði Erling dystin.

Seinasta partin av fyrra hálvleiki varð Magnus tó sendur á vøllin, og hann hevði eisini nakrar bjargingar undan steðginum.

Eftir steðgin gjørdi hann tó ein ordans vørr. Fleiri ferðir bjargaði hann kjansum, sum vóru upp ímóti teimum 100 prosentunum, og eins ofta lukkaði hann av fyri møguleikanum, soleiðis at skotroyndin frá mest sum leysa vestmenninginum varð yvirplaserað.

– Hetta var ein av teimum heilt frægu dystunum hjá mær higartil í ár. Vit hava sjálvandi vant nógv, og fyri meg hevur tað gjørt øgiligan mun, at vit hava ein málmansvenjara. Tað hevur kanska ikki gingið eins væl allar dystirnar, men í dag riggjaði tað í øllum førum øgiliga væl, segði Magnus eftir dystin.

Og tá tú so byrjar seinna hálvleik, sum tú gjørdi í dag. Er tað so bara soleiðis, at tingini henda av sær sjálvum?

– Tú kemur meira ella minni í eina støðu, har tú als ikki hugsar um tingini. Tú sært bara bóltin fyri tær, og tað er deiligt, tá tað hendir. Eg hugsaði sum so slettis ikki um, hvussu teir skutu. Eg fór bara har, sum skotini komu, segði ein serstakliga væl nøgdur Magnus Matras, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin.

### VÍF í botni

Sigurin ber við sær, at Kyndil nú veruliga er við í kappingini í oddinum. Enn eru Neistin og StÍF á teimum báðum finalusessunum, men við bara tveimum stigum upp, kann tann støðan broytast heilt skjótt.

Hjá VÍF er støðan hinvegin einki hugagóð. Teir eru framvegis ájavnir kollfirðingum í stigum, og skulu teir vinna seg úr botnstríðnum, skulu fleiri lutir broytast. Fyrst og fremst skal høvdið brúkast meira í spælinum, og so hevði tað helst ikki gjørt nakran skaða, um menn dugdu at vera kaldari í skotstøðunum. Tí góður málverji ella ikki, so skulu gjarna fleiri enn 23 mál til fyri at vinna nakran hondbóltsdyst í bestu mansdeildini.

## Spæla sum eitt botnlið

Fyrstu umførini var líkt til, at VÍF skuldi vera við í kappingini um pláss í FM-finaluni, men tann vónin er væl og virðiliga broytt. Og eftir sjey umfør er liðið ájavnt við KÍF á botnsessinum.

Venjarin hjá VÍF, Jónleif Sólsker, var eisini skjótur at ásanna, at hetta var ikki nóg gott.

– Hetta er sjálvandi ikki tað, sum vit ætlaðu. Vit hava spælt væl í løtum, men tað er ov langt ímillum, at vit koma í góðar støður. Og tá vit koma í góðar støður, eru vit ikki nóg kaldir.

Tað at mann brennir so nógv. Er tað ein mentalur trupulleiki, ella er mann bara ikki nóg góður?

– Tað er ein góður spurningur. Mentalt eru spælararnir kanska ikki vanir at vera í støðuni, sum teir nú eru í, og tí skulu teir kanska yvirprætera fyri at koma skjótt upp eftir talvuni, heldur enn at taka ein dyst í senn og royna at vinna hann. Tí í løtuni sær tað út til at vera trupult hjá okkum at vinna ein dyst.

Og tit hava kollfirðingar beint í hølunum. Er tað eitt trýst, sum tit merkja?

– Tað er so ikki tann behagiligasta støðan at vera í. Eg meini sjálvur, at vit eru klárt betri enn KÍF. Men í løtuni spæla vit sum eitt vánaligt botnlið, staðfestir Jónleif Sólsker.

-mørk